UTTAN ÚR HEIMI

# Fleiri vilja ættleiða lítlu Angel

**Ein hundur fann ta fjúrtan dagar gomlu gentuna og bar hana til hús. Nú vilja fleiri sleppa at ættleiða hana**

UNDUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Myndirnar av teirri lítlu gentuni eru farnar um allan heimin, og tær hava eftir øllum at døma ávirkað mong. Tí nú hava myndugleikarnir í Kenya fingið tilboð frá fólki í Japan, Suðurafrika og Venesuela, sum fegin vilja sleppa at ættleiða Angel.

– Hon bleiv tveitt burtur sum burturkast, og í dag verður hon mett sum eitt satt undur, sigur Catherine Gicheru. Hon er blaðstjóri á kenyanska blaðnum Daily Nation, sum bar søguna um ta lítlu gentuna.

Søgan er eisini rættiliga sjáldsom og hugtakandi. Ein týk fann ta lítlu gentuna. Varisliga beit hon í eitt plagg, sum gentan var í, og síðani bar hon gentuna til hús og legði hana ímillum sínar egnu hvølpar.

Gentan bleiv alt fyri eit flutt á Kenyatta-sjúkrahúsið, og læknarnir siga, at hon hevur tað gott. Mong hava ringt til sjúkrahúsið við tilboðum um pengar, klæðir og annað, og so eru tað eisini tey, sum bjóða sær til at ættleiða Angel.

Kenyansku myndugleikarnir siga, at teir fara at viðgera umsóknirnar um ættleiðing seinni.



*Fleiri vilja sleppa at ættleiða ta fjúrtan dagar gomlu Angel*

*Mynd: Reuters*

## Pápin tikin

Løgreglan í amerikanska býnum Zion hevur tikið ein mann, sum er skuldsettur fyri at hava beint fyri dóttur síni og einari aðrari gentu.

Tann átta ára gamla Laura Hobbs og níggju ára gamla Krystal Tobias hvurvu sunnudagin. Tá tær ikki komu afturíaftur, fór løgreglan at leita eftir teimum, og mánamorgunin vórðu tær funnar myrdar í einari lund.

Tað var pápi Lauru Hobbs, Jerry Hobbs, sum vísti løgregluni, hvar tey bæði líkini vóru. Hann greiddi frá, at hann var farin at leita eftir gentunum, og at hann hevði funnið líkini í lundini. Hann hevði so boðað løgregluni frá. Men løgreglan hevði ilt við at trúgva honum, og nú verður hildið, at tað var Jerry Hobbs sjálvur, sum beindi fyri teimum báðum gentunum.

Ein talsmaður hjá løgregluni í Zion sigur við AP, at tær báðar genturnar vórðu illa viðfarnar, áðrenn tær vórðu myrdar við knívi. Hinvegin er einki, sum bendir á, at tær vórðu kynsliga misnýttar, sigur hann.

## Dýrt kríggj

Í USA hevur Senatið játtað herleiðsluni 82 milliardir dollarar ella 475 milliardir krónur í eykajáttan.

Tað mesta av pengunum fer til at keypa útgerð, ið skal brúkast í Irak og Afghanistan. Sambært verjumálaráðnum Pentagon skulu hermenninir í Irak hava fleiri akfør av ymsum slagi, og ein partur av pengunum skal brúkast til betri trygdarútgerð. Sambært Pentagon nøktar tann nýggja eykajáttanin tørvin til tann 30. september, men verjumálaráðið hevur ikki sagt, hvussu nógvar pengar tað skal hava afturat í ár.

Allir senatorarnir atkvøddu fyri eykajáttanini. Fremsti talsmaðurin var republikanski senatorurin Trad Cochran, sum segði pengarnar vera av størsta týdningi fyri teir amerikonsku hermenninar, sum taka lut í krígnum ímóti yvirgangi, og sum skulu hjálpa teimum sameindu hjá USA.

## Nýtt fiskaslag

Higartil hava vísindafólk skrásett umleið 40.000 plantu- og djórasløg í Noregi, men hildið verður, at umleið 15.000 smá skriðdjór og onnur smádjór eru ikki skrásett enn.

Harafturímóti hava vísindafólkini hildið, at skrásetingin er rættiliga fullfíggjað, hvat fiskasløgum viðvíkir, og tí var tað einki minni enn ein stórhending, tá granskarar í síðstu viku kundu vísa eitt higartil ókent fiskaslag. Talan er um ein ljósan og næstan gjøgnumskygdan fisk, sum er funnin á 430 metra dýpi í Tinnsjøen í Telemark.

Tann 5. apríl eydnaðist tað at fáa tveir fiskar upp úr dýpinum. Teir vóru ávikavist 3,7 og 7,0 centimetrar til longdar, men myndir, sum eru tiknar í dýpinum, vísa, at hetta fiskaslagið verður í hvussu er einar 15 cenrimetrar.

Í veruleikanum hava norðmenn vitað um hetta fiskaslagið síðani 1993, tá eitt kavaralið leitaði eftir vrakinum av ferjuni Hydro, sum bleiv søkt í Tinnsjøen í 1944. Tá avdúkaðu myndatólini hjá kavarunum nakrar smáar ljósar fiskar, men ta ferðina bleiv einki gjørt fyri at kanna, hvat hetta var fyri fiskur.

## Bjarga ísi

Tann altsamt veksandi hitin á Jørðini hevur havt við sær, at ísurin í Alpunum er minkaður nógvastaðni tey seinnu árini, men tað eru tey, sum hava sett sær fyri at forða ella í hvussu er tálma hesum.

Í sveisiska býnum Gemsstock hava tey nú spent eitt risastórt teppi rundan um eina ísflatu fyri at forða fyri, at hon skal bráðna. Teppið er ímillum 3.000 og 4.000 fermetrar stórt og er gjørt úr einum evni, sum sendir sólstrálurnar frá sær. Á tann hátt vóna stigtakararnir at halda hitanum burturi, so tey kunnu varðveita ísflatuna, skrivar AP.

Sveisisk vísindafólk halda, at hugskotið í Gemsstock er gott, men Wilfried Haberle, professari á lærda háskúlanum í Zúrich, sigur, at sjálvandi ber tað ikki til at bjarga ísinum í Alpunum við at leggja teppi man á hann.

# Tekur kanska 100 ár at rudda bretsku kjarnorkukøstarnar

**Sellafield er bara ein av mongum kjarnorkutrupulleikum, sum bretsku myndugleikarnir hava at stríðast við**

KJARNORKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri einum mánað síðani fór bretska kjarnorkueftirlitið undir at fáa skil á teimum tjúgu niðurslitnu kjarnorkuverkunum í Bretlandi. alan er um fimm reaktorar, fimm endurvinningarvirki, tríggjar brennievnigoymslur, fimm rannsóknarstovur og eitt virki, sum hevur verið brúkt til at ríka uran í.

Mánadagin kom fram, at ein stórur leki hevur verið á endurvinningarvirkinum Sellafield. Bretar varnaðust lekan tann 18. apríl, men ikki fyrr enn tríggjar vikur seinni kunnaðu myndugleikarnir um tað, sum hent var. Eitt nú fingu teir norsku myndugleikarnir boð um lekan í síðstu viku, og tað eru norsku myndugleikarnir ikki nøgdir við.

Bretska kjarnorkueftirlitið hevur sett sær fyri at rudda eftir lekan í Sellafield, samstundis sum tiltøk skulu fremjast fyri at avmarka dálkingina frá hinum verkunum. Hetta arbeiðið skal gerast í ár og er mett at kosta góðar 22 milliardir krónur.

Nevndarformaðurin í eftirlitinum, Anthony Cleaver, hevur sagt, at tað fer at taka ímilum 50 og 100 ár at rudda øll tey bretsku verkini, og at kostnaðurin verður umleið 550 milliardir krónur, skrivar Aftenposten.